# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 14. desembur 2023, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Pauli T. Petersen, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen og Ingi Olsen
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

---

Áðrenn fundin greiddi Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, frá, at síðani skráin varð løgd, er eitt nýtt mál innkomið. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið varð sett á skrá sum mál nr. 248

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 243**
Eykajáttan til umsókn um loftslyftir til Heimið á Grønanesi til 2. viðgerð
J.nr.: 8301042-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. novembur 2023 umsókn um seks loftslyftir til heimið á Grønanesi.
Í telduposti dagf. 8. august 2023 sendi Niels A. Joensen, leiðari í VEKS, umsókn um at fáa eina íløgu í 6 loftslyftir til búrúm á Heiminum á Grønanesi í inniverandi fíggjarári.

Fíggjarnevndin mælti til at samtykkja eykajáttan á kr. 100.000 til tvær loftslyftir, fíggjað av endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri 2023.

Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt við 1. viðgerð á fundi tann 23. novembur 2023 tilmælið frá Fíggjarnevndini um eykajáttan á kr. 100.000 til tvær loftslyftir.

**Viðv. 243**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 244**
Endurskoðað fíggjarætlan fyri 2023 til 2. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. novembur 2023 endurskoðaðu fíggjarætlanina fyri 2023.
Nevndin mælti til, at endurskoðaða fíggjarætlanini fyri 2023 varð løgd fram.

Á fundi hjá bygdarráðnum tann 23. novembur 2023 varð uppskotið til endurskoðaðu fíggjarætlan fyri 2023 lagt fram til 1. viðgerð.

**Viðv. 244**
Endurskoðaða fíggjarætlanin fyri 2023 varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 245**
Áseting av almennum fundardøgunum fyri fyrra hálvar 2024

Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, heitti á bygdarráðið um at áseta almennu fundardagarnar hjá Vestmanna Bygdarráði fyrra hálvar 2024 til hesar:

- Hósdag - 25. januar - kl 17:00
- Hósdag - 22. februar - kl 17:00
- Hósdag - 21. mars - kl 17:00
- Hósdag - 18. apríl - kl 17:00
- Hósdag - 30. mai - kl 17:00
- Hósdag - 20. juni - kl 17:00

**Viðv. 245**
Ingi Olsen skeyt upp at flyta bygdarráðsfundirnar til mikudagin áðrenn ásettu dagfestingar. Bygdarráðið samtykti einmælt uppskotið hjá Inga Olsen.

**Mál 248**
Seyðahús hjá Fjalshaga (j. nr. 8201002-4-2020) og Fiskastykkið (j. nr. 509062-1-2020)

Bygdarráðið setti upphæddir av til at gera seyðahús til Fjalshaga afturfyri lendi til Fjalsveg og at gera parkeringspláss á fiskastykkinum í Toftabø.

Hesi arbeiðir verða tíverri ikki liðug í 2023, og fer umsitingin tí saman við borgarstjóranum at heita á Bygdarráðið um at taka undir við, at hetta verður tikið jaliga upp til eina endurskoðaða fíggjarætlan fyri 2024.

Upphæddirnar eru hesar:

1. Seyðahús kr. 276.600
2. Fiskastykkið kr. 400.000

**Viðv. 248**
Bygdarráðið samtykti einmælt uppskotið.

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 18:00

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Pauli T. Petersen Eyðun Hansen

Laila Haldansen Anja Haldansen Ingi Olsen